# Fortíðin vaknar á Tinganesi




*Komið við mær, eg skal vísa tykkum, hvat ið er at finna, tykist Rolf Guttesen at siga við lesaran í bókini »Spor í Tinganesi«*

**Bókin *Spor í Tinganesi* gevur lesaranum næstan kenslu av, at fólkini, sum hava skavað og rist í helluna, bara eru farin heim til døgurða**

UMMÆLI
*Erland Viberg Joensen*

Hóast bókin *Spor í Tinganesi* eftir Rolf Guttesen er løtt at lesa, er tað ikki bara sum at siga tað at ummæla eina slíka bók. Hon er líkasum onkustaðni millum eina vanliga guidebók og vísindi. Onkur annar átti at roynt at givið *Spor í Tinganesi* hjá Rolf Guttesen nøkur orð á leiðini, men tað hevur verið so eiðasørt. Bókin hevur longu eitt heilt ár á baki, men uttan at hava fingið aftursvar, og fær hon tí hesi orðini.

Tey, sum kenna Rolf Guttesen, vita, at hann altíð fer metodiskt til verka. Tað er vísindamaðurin sum kemur fram í hann, og tað sæst eisini, nú ið hann hevur Tinganes sum evni –Tinganes, sum Jørgen-Frantz Jacobsen í meistarligu hugleiðingini 'Torshavn' (Politiken 25. juli 1930) hevur sagt er millum vágirnar »*Østre-* og *Vestrevåg*, de to vige, som byen er vokset op omkring (...) De to våge ligger og strækker deres favn lige ud mod det åbne Atlanterhav og den vide verden med al dens søfart og handel og herlighed«

Tað er tí ikki altíð neyðugt at fara so langt fyri at síggja okkurt nýtt, og tað sæst, at Rolf Guttesen hevur hugnað sær í leitanini eftir sporum úti í Tinganesi, og í gomlum umhvørvum og býarpørtum í Havn.

Eru ferðafrásagnir væl skrivaðar, eru tær spennandi keldur at lesa. So sveimar tú, og tú verður uttan at vita tað sogin inn í umhvørvið. Í bókini hjá Rolf Guttesen eru næstan ongi fólk, men tú sær borihol, kílar, árstøl, bókstavir, búmerki hvørt um annað. Tað er næstan so, at fólkini, sum hava skavað og rist í helluna, bara eru farin heim til døgurða.

Vísindi er um undran og forvitni. Hjá Rolf Guttesen hevur setningurin verið at finna mannaskaptar slóðir, og harnæst eisini at avsanna, at tað, ið eygað sær, ikki altíð eru spor og merki, men tað, ið hann í fleiri førum nevnir delusiónir – t.e. spor, sum fatast skeivt. V.ø.o. snýr bókin seg um identifikatión – og harnæst at leiða okkum ein túr út í tann gamla býin. Tað er ikki altíð at vit fáa at vita, hvat merkini siga okkum – og verri enn so, men samband fæst við fortíðina, vit fáa suðið frá søguni. Her hava fólk búð og virkað í øldir. Tað sæst á steinum og húsum og helluni úti í Tinganesi.

Komið við mær, eg skal vísa tykkum, hvat ið er at finna, tykist Rolf Guttesen at siga við lesaran. Leiðin byrjar á Kongabrúnni. Farið verður framvið fjøruna á Eystaravág, Tinganes, Vestaravág, inn í Bringsnagøtu, við Húsabrúgv, yvir í Laða-, Króka- og Amtmansbrekkuna, og túrurin endar úti í Sandagerði, tils. 19 lokalitetir, og á leið 100 spor. Ikki øll støð eru spennandi, og skulu nøkur veljast, ja, so er nr. 2: ANO-steinurin, helst frá 1609. Rolf Guttesen sær árstalið hava samband við kirkjuna á Reyni. Tey flestu kenna steinin. Nr. 3: LIVA-steinurin er eisini hugtakandi. Liva heldur Rolf vera eitt skip frá 19. øld.

Rolf Guttesen er ein kritiskur eygleiðari, men av og á noyðist hann at gita, og av og á kann hann tykjast at vera í so skjótur. Tað kann vera, at hann fær ikki afturhald. T.d. heldur hann samband vera millum nr. 13-1 á Skinnaskeri – har stendur AMA, og nr. 19-8, á brúnni um Sandá – har stendur AM AR 1835. Hví er samband millum hesi bæði merkini? Rolf Guttesen hevur hetta sum eina av fleiri niðurstøðum, og tað er fínasta slag, men, men...

Sámal Petersen var tann, sum í nýggjari tíð gjørdi eina roynd at skráseta og siga okkurt um merkini í greinini: 'Tingstaðurin í Tinganesi' (1972). Rolf Guttesen vísir avrikinum hjá Sámali Petersen ans, men avsannar fleiri niðurstøður hjá Sámali. Har eru fleiri delusiónir. Aðrir, sum hava sagt nakað um merkini, verða vigaðir og fáa somu viðgerð, men tað góða við Rolf Guttesen er, at hann tekur í egnan barm, og vísir á skeivar niðurstøður hjá sær sjálvum. Tað er ein avgjørd styrki í bókini. Rolf Guttesen ger nógv við at flokka sporini. Tey eru ikki bara búmerki, men eisini initialmerki, mono- og christogrammir, nøvn og árstøl – og ikki minst grafitti – antikvarisk grafitti, kunnu vit siga.

Ísavninum 'Seinasta útróðrarferðin og onnur brot' (1985) er søgan 'Pumparnir í Havn' eftir Magnus Dam Jacobsen. Her verður sagt frá, at nakrir einaferð sótu í góðveðrinum í Tinganesi og smakkaðu sær á: »Skýmingin kom á. Vit reistu okkum. Gingu tær gomlu slitnu steintrappurnar við tí rustgarvaða gelendaranum. Tigandi, hvør í sínum tonkum. Ansaðu eftir ikki at glíða á teimum hálu steinunum, ið drignir vóru við grønum slíggi. Funnu rivur og kantar í múrinum...«, o.s.fr. Kann tað hugsast, at fólk altíð hava brúkt Tinganes sum eitt stað til dagdvølju og at steðga á her í lívinum, eins og Magnus hevur lýst, og at fólk hava stytt sær stundir við eisini at rista í helluna? Kunnu vit brúka stuttsøguna hjá Magnusi, og spyrja, hví spor eru her, og um tey nú partú og altíð skulu hava eina merking?

Rolf Guttesen brúkar krútið við at siga, at tey flestu sporini og støðini hava okkurt við sjógvin og sigling at gera. Tinganes er ikki bara tingstaður. Besta dømi hjá Rolf Guttesen er kenda sólurið, ið øll vita um, men sum sambært Rolf Guttesen er ein kumpassrósa. Forrestin, so er lítla sólurið somuleiðis eisini ein